


# Fiskivinnuroyndir 2021-2023

## Søla av royktum pelagiskum fiski til heimsmarknaðin
## Endalig frágreiðing frá verkætlanini í samband við at verkætlanin er liðug



SJÓGÆTI
Fresh from Faroe Islands
Garðsvegur 7 | 470 Eiði | V-tal: 4912
Tel.: +298231601 | t-postur: hm@sjogati.fo

## Innleiðing/Bakgrund

Við hesum verðu latin frágreiðing fyri seinasta partin av verkætlanini "Søla av royktum pelagiskum fiski til heimsmarknaðin". Verkætlanin er gjørd liðug í 2023, hóast játtanin fyri 2023 ikki var tøk, tá vit sendu okkara seinastu umbøn og frágreiðing inn. Hetta grunda á eina misskiljing millum Sjógæti og Fiskivinnugransking, í samband við umbøn um liðuggerð av síðsta partinum og útgjald. Í skrivinum frá FVG fingu vit tó at vita, at vit kundu søkja um síðsta partin av verkætlanini í ár, og tað byggir hendan umsóknin á.

Verkætlanin byrjaði, sum kunnugt í 2020 við umfatandi út-og umbyggingum av framleiðsluhølum og útgerð á nýkeypta virkinum á Eiði. Sjógæti hevði frammanundan eisini drúgvar royndir við royking av vørum á virkinum á Norðskála, so tí var tað natúrligt at fara víðari og satsa uppá royktan makrel og sild.

Fyrsti partur av framleiðsluni á Eiði snúði seg um at fáa alt at koyra, soleiðis at úrtøka o.a. kom á eitt nøktandi støði, samstundis sum útgerðin kláraði tann effektivitet, sum ætlaður var.

Málið bleiv rokkið við at byrja við frystum makrel- og sildafløkum. Við hesi framleiðslu vóru gjørdar royndir við royktum vørum, sum eru sendar út til kundar. Vit hava roynt fleiri av vørunum á føroyska marknaðinum eisini, og sendu í seinnu hálvu av 2022 bæði royktan makrel og sild út til føroyskar kundar, sum eitt menningarlið í at røkka víðari til útlendska marknaðin.

Sum nevnt í uppruna-umsóknini, staðfestu vit ein rímiligan eftirspurning eftir skin-pakkaðum kølivørum, t.e. at tey roykt fløkini verða pakkað í (modificeret atomsfære). Vanliga er haldføri á royktum makrelflaki uml. 14 dagar, men tá hann er skin-pakkaður, fer haldføri úr 14 upp til 30 dagar. Slík vøra kann tí bjóðast út á allar marknaðir í ES sum kølivøra, sum serliga er áhugavert fyri detail-marknaðin.

Verkætlanin hevur verið sett saman stigvíst, har innleiðandi marknaðarkanningar eru gjørdar, fyri at nágreina tørvin. Síðan verkætlanarbyrjan 2020 og fram til Nov. 2022 vóru nýggjar maskinur útvegaðar og tøkni til hesa framleiðslu. Korona farsóttin gjørdi tað tó sera trupult at menna góða sambond við nýggjar kundar í meira enn 1 ár, m.a. tí at tað ikki bar til at hitta hesar fysiskt. Tí varð nógv av tíðini brúkt til at menna tær vørur, sum hendan verkætlanin tekur útgangsstøðið í.

## Endamál við verkætlanini

At kanna marknaðaratgongd í ES, Eystur Evropa og Russlandi, og fáa til vega hóskandi tøkni til pakking.
*GG: Grundað á støðuna við Russlandi, er bert satsa uppá ES (serliga Týskland) og Eystur Evropa annars.*

## Lýsing av verkætlanini í síni heild (fleiri ár)

Í sambandi við at lýsa heildina í verkætlanini varð hendan tíðarætlan gjørd (nú dagførd við 2023):

| | 2021 | | | | 2022 | | | | 2023 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Virksemi** | **1kv** | **2kv** | **3kv** | **4kv** | **1kv** | **2kv** | **3kv** | **4kv** | **1kv** | **2kv** | **3kv** |
| Marknaðarkanningar | X | X | | X | | | X | | X | X | |
| Gera kølirúm | | | | | | X | | | | | |
| Gera Pakkirúm | | | | | | | X | | | | |
| Keypa -Pakkimaskinu | | | | | | | X | | | | |
| Pakning | | | | | | | | X | X | X | |
| Vøruroyndir til útlendskar kundar | X | X | X | X | X | X | X | X | X | | |
| Heilsufrøðiligar vørukanningar v.m. | | X | X | X | X | X | X | X | X | | |
| Útvega sáttmálar við útlendskar kundar | | | | X | X | | | X | X | X | |

**(grønt = liðugt) (gult = ígongd) (reytt = ikki víst seg gjørligt at røkka undir verandi umstøðum)**

Í arbeiðinum við at útvega sáttmálar við útlendskar kundar (niðasta punktið), varð hetta, sum nevnt, útsett nakað orsaka av korona støðuni. Tá ein leverar slíkar krevjandi vørur, er tað neyðugt at møta kundunum fysiskt, og umrøða vøruna og søluhættir v.m. Hetta var ikki gjørligt meðan samfeløg vóru afturlatin, so tí kom ikki verulig gongd á tann partin fyrr enn í seinnu helvt av 2022. Nevnast kann, at serliga týski marknaðurin sýndist klárur at taka ímóti vøruni, har ætlanin var at fáa eitt samstarv við Horeka v/Carl á Lag. Ætlanin var at byrja við smærri handlum, sum so kunnu skapa gróðrarbotn fyri víðari vøkstri. Vøruroyndir eru eisini sendar til aðrar kundar, m.a. í Italia.

*Gjøgnum 2023 er marknaðurin tó heilt broyttur. Sum flestu kunnugt, er meginparturin av føroyska makrelinum farin til mjølframleiðslu, grundað á sera lágan prís fyri lidna vøru, og høgan mjølprís. Samstundis er kostnaðarstøðið í Føroyum hækkað nógv, og hesi bæði tingini samanlagt hava viðført, at vit, Sjógæti, fyribils hava valt at steðga við at framleiða makrel og sild til útlendska marknaðin, tí kundarnir klára ikki at gjalda fyri føroyska framleiðslukostnaðin, soleiðis sum marknaðurin er í løtuni.*

## Stýrisbólkur og/ella fylgibólkur:

**Stýrisbólkur**

| Navn | Fyritøka/stovnur |
|---|---|
| Pól Huus Sólstein | North Pelagic |
| Hans Marius í Byrgi | Sjógæti |
| Viðkomandi persónur úr samstarvsfyritøku | Supermarknaður í ES |

**Fylgibólkur**

| Navn | Fyritøka/stovnur |
|---|---|
| Símun Hammer | VRG |
| Poul Huus Sólstein | North Pelagic |
| Viðkomandi persónur úr samstarvsfyritøku | Supermarknaður í ES |

## Samstarvsfelagir í Føroyum og uttanlands. Leiklutur og arbeiðsbýti partanna millum.

| Stovnur/fyritøka | Persónur | Leiklutur/ábyrgd |
|---|---|---|
| VRG | Símun Hammer | Ráðgeving og skjalprógvan |
| North Pelagic | Poul Huus Sólstein | Søla |
| Sjógæti | Hans Marius í Byrgi | Framleisla |
| Supermarknaður í ES / Horeka | Carl á lag | Ikki staðfest endaligt enn. |

## Verkætlanarúrslit

Arbeiðið við at fáa neyvari vitan um kundar og marknaðir, og vørutørv er rokkið, sum víst omanfyri. Men úrslitið gjøgnum 2023 hevur verið sera neiligt, grundað á nógv broyttu fyritreytirnar fyri hesum virksemi. Sjógæti hevur tí fyribils valt at steðga við at framleiða makrel og sild til útlendska marknaðin, sum er sera trupul í løtuni. Eisini hava norðmenn keypt seg nógv inn í hesa framleiðsu í Pólandi, har kostnaðarstøði er munani lægri enn í Føroyum.

Øll onnur verkætlanarúrslit eru tó rokkin. Pakkimaskinan frá Multivac (Map-Skinn) kom upp at koyra og pakningur eisini útvegaðu. Pakkimaskinan kann eisini brúkast til aðrar vørur úr havinum.

Málið hjá okkum var at verða komin inn í eina handilsketu í ES í 2023. Hetta rukku vit sum nevnt omanfyri ikki – og vit meta ikki at útlit eru fyri hesum í nærmastu framtíð.

**Hvussu verða úrslitini miðlaði út til onnur?**

Úrslitini hava verið skjalprógvað so hvørt gjøgnum verkætlanina, og miðlaði í føroyskum miðlum, og annars til kundar tá onkrir 'milestones' hava verið náddir. Vit høvdu ætlan um at hava opið hús á virkinum ein dag, har fjølmiðlar, samstarvsfelagar og fólk annars kundu síggja hvat vit vóru í gongd við, og hava eisii havt onkrar stovnar og onkrar skúlaklassar inniá virkinum og víst teimum hvat vit eru í gongd við. Men fyribils ber sum sagt ikki til at gera meira á hesum øki í løtuni.

**Ávegis samandráttur:**

Vit meta framvegis, at hendan verkætlanin hevur givið okkum týðandi vitan um virðisøking av fiski og fiskavørum – serliga til heimsmarknaðin. Sjógæti harmast sjálvandi, at úrslitið við at røkka út á útlendska marknaðin við okkara vørum ikki hevur eydnast, men tær royndirnar sum vit hava gjørt, hava viðført stórt fíggjarligt hall fyri okkum. Tá tað ikki ber til at fáa hesa framleiðslu at rigga á einum lønandi grundarlagið, hava vit sæð okkum noydd til at steðga við hesi framleiðsluni fyribils, og konsentrera okkum um heimamarknaðin gjøgnum virksemið á Norðskála.

Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum:
Í dag er ikki so nógvur førleiki í Føroyum um virðisøking til lidnar pelagiskar vørur. Onki annað føroyskt virkið hevur gjørt júst tað sum vit hava roynt, og tí er hendan vitanin eisini eitt úrslit, sum liggur eftir gjøgnum verktlanina.

**Listi yvir fylgiskjøl:**

1. **Numo grannskoðaravátttan av beinleiðis útreiðslum til verkætlanina**
2. **Umsóknarblað um útgjald fyri síðsta part av verkætlanini.**

23.

| | | |
|---|---|---|
| **Eiði** | **07.12.2023** | SJÓGÆTI FO-460 Norðskála Tlf-Fax 422600 - 422601 |
| **Staður** | **Dagfesting** | **Undirskrift umsøkjarans** |